# Føroyskt-Ísraelskt fagnarkvøld í Norðurlandahúsinum

**Alment Føroyskt-Ísraelskt fagnarkvøld í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið 13. mai**

TÍÐINDASKRIV

Í samband við at 30 ár eru liðin síðani Svenning av Lofti byrjaði sum ferðaleiðari til Ísraels, skipa feløgini "Ísraelsfelagið" og "Vinir Ísraels í Føroyum" fyri almennum føroyskum-ísraelskum fagnaðarkvøldi í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið 13. mai, kl. 19.30.

### Sangur og tónleikur

Skráin fyri fagnaðarløtuna í Norðurlandahúsinum verður fjølbroytt við sangi, tónleiki og gestaheilsanum úr Ísrael. Ebenezerkórið, Heini Lutzen, Leigh (Li) Hjaltalin, Dreingjakórið undir Brúnni og Sigrið Rasmussen fara at syngja. Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð fer at spæla klaver og Monika Stauss Joensen fer at spæla fiól.

### Gestir úr Ísrael

Tríggir gestir úr Ísrael verða við í føroyska-ísraelska fagnaðarkvøldinum. Teir eru: Hannah Erez, ið hevur verið staðkendur leiðari (guide) á mongum av ísraelsferðunum, Danny Amir, ið hevur samskipað flestu Ísraelsferðirnar og David Walzer, Ísraelski sendiharrin í Danmark.

Felagsskapurin "Keren Hayesod", ið virkar fyri at fáa at savna pening til at fáa jødar heimaftur til Ísraels, verður eisini umboðaður í Norðurlandahúsinum av Jan Rosenberg og Yitzchak Lev, ið fara at skipa fyri eini framsýning í forhøllini.

Norðurlandahúsið letur upp kl. 14 og framsýningin verður opin hendan seinnapartin. Møguleiki verður at keypa sær ein drekkamunn.

### Atgongumerki

Kostnaðurin fyri atgongumerki er kr. 100. Yvirskotið fer óskert til kristna blindaheimið "House of Hope" í Betlehem, sum nógvir føroyingar kenna frá vitjanunum í Ísrael.

Umframt í Norðurlandahúsinum, tlf. 351351, teldupostur: nlh@nlh.fo fáast atgongumerki eisini á hesum støðum: Kunningarstovuni í Havn, tlf. 302425,

Kunningarstovan í Runavík, tlf. 449449 og Kunningarstovuni í Fuglafirði, tlf. 444860

Fyriskiparar: "Vinir Ísraels í Føroyum" og "Ísraelsfelagið"





## Bygningur til sølu

Matr. nr. 772 h og 777 f, Niels Finsensgøta 51.

3 x 100 m².

Bygningurin hevur verið nýttir til vinnuligt endamál. Bygningurin er í góðum standi og er væl bjálvaður. Vindeyguni eru nýggj. Takið verður skift. Útsýnið er gott.

Ein perla í býnum beint yvirav av Sjónleikarhúsinum. Ein góð íløga fyri tann rætta!

Verður selt um nøktandi boð fæst.

Ring á tlf. 21 33 03

Keypssamtøkan í Hoyvík

FK í Hoyvík sóknast eftir

***Fólki til kioskina***

at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin verður frá 9.00 til 13.30 mánadag til fríggjadag og annanhvønn leygardag.

Løn:
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Bent Lundsgaard, tel 214016

Skrivlig umsókn skal, í seinasta lagi leygardagin 12. mai, sendast til

FK Hoyvík
Brekkutúni 9
FO 188 Hoyvík
att: Bent Lundsgaard

SUNDA KOMMUNA

## Leiðari til Dagstovnin við Stórheygg í Hósvík

samsin.fo

Søkt verður eftir leiðara til dagstovnin, at byrja tann 1. juni 2007 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og tann setti skal hava námsfrøðiliga útbúgving.
Dagstovnurin er skipaður við fýra stovum við børnum frá 0 til 10 ár.

**Vit ynskja:**
- At tú hevur hug og hegni at leiða, dugir at samstarva og ert fyrikomandi.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og foreldrunum.
- At tú hevur hug at skapa og seta dám á okkara dagstovn.
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- At tú hevur ein virknan lut í samstarvinum við hinar leiðararnar á dagstovnaøkinum í kommununi.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til verandi leiðara, Honnu Thøgersen, tlf. 772020, ella leiðaran á sosialu deild, tlf. 471022 ella 771023.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 24. mai 2007, og skulu sendast til:

Sunda kommunu
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
Fo-400 Oyrarbakki.

Dagstovnurin við Stórheygg í Hósvík er ein av trimum dagstovnum í Sunda Kommunu. Dagstovnurin er normeraður til 58 børn, og har eru í løtuni 14 starvsfólk. Dagstovnaleiðararnir á økinum, tvs. í Hósvík, á Oyrarbakka og í Hvalvík, hava eitt gott og tætt samstarv á økinum í samráð við kommununa.